# Ársfrágreiðing 2023

KVINNUHÚSIÐ/KREPPUMIÐSTØÐIN/LIV UTTAN HARÐSKAP

# Innihald:


| | |
|---|---|
| **Síða 3** | **Inngangur** |
| **Síða 3** | **Brot út forkvinnufrágreiðingini** |
| **Síða 5** | **Tøkk til allar stuðlar** |
| **Síða 5** | **Hagtøl** |
| **Síða 6** | **Áheitanir** |
| **Siða 8** | **Gistingar** |
| **Síða 9** | **Kvinnuhúsgrunnurin** |
| **Síða 9** | **Kvinnuhúsfelagið** |
| **Síða 10** | **Sjálvboðið arbeiði** |

# Inngangur

Heilt yvirskipað hevur Kvinnuhúsið tvey ymisk tilboð til harðskapsrakt í parlagi og nærsambondum. Talan er um eina *Kreppumiðstøð* fyri harðskapsraktar kvinnur og møgulig børn, og eina ambulanta Ráðgeving *Liv uttan harðskap*, sum er fyri kvinnur, menn og avvarðandi.

Á Kreppumiðstøðini kunnu harðskapsraktar kvinnur og børn teirra gista í eitt avmarkað tíðarskeið. Starvsfólk á Kreppumiðstøðini veita holla ráðgeving í samband við, hvussu kvinnur og børn teirra kunnu fóta sær víðari í lívinum, við teimum ymisku hjálparmøguleikum sum finnast.
Í Liv uttan harðskap kunnu fólk, sum eru ella hava verið fyri harðskapi í parlagi og nærsambondum, fáa einstaklinga samrøður ella í bólki, luttaka í sjálvhjálparbólki og/ella fáa samrøður hjá sálarfrøðingi.

Harðskapsraktum tørva ofta stuðul og vegleiðing, og eina gjølla greining av samansettu trupulleikunum. Hetta krevur eina servitan í hjálpar- og stuðulsmøguleikum, bæði innan almenna- og privata geiran, sum t.d. innan samfelagsliga, sosiala, sálarliga og løgfrøðiliga økið. Við hjálp, vegleiðing og undirvísing kunnu harðskapsrakt fáa størri innlit í egnu støðu og teir hjálparmøguleikar sum finnast, eins og styrki til at leggja ætlanir og taka avgerðir, sum passa til teirra tørv og ynskir fyri framtíðina.
Hjá harðskapsraktum kann tað verða trupult at hugsa klárt, at varðveita yvirlitið, og at hava orku til at seta seg í samband við stovnar og myndugleikar. Sjálvsálitið er undir trýsti, og ofta er neyðugt at fáa hjálp til at síggja ymisku møguleikarnar, umframt stuðul til at samskipa bæði privatar og almennar loysnir.

Eftir ein steðg við sjálvhjálparbólkum varð skipað fyri bólki aftur í 2023. Kvinnur, sum eru ella hava verið útsettar fyri harðskapi hittust at deila upplivingar, finna loysnir og at stuðla hvørji aðrari. Tveir ráðgevar í Kvinnuhúsinum vóru við í bólkinum, og løgdu lag á.

# Brot úr forkvinnufrágreiðingini

Hvat hava vit so arbeitt við síðan síðsta aðalfund?

## Heildarverkætlanin “Harðskapur í parlagi og nærsambondum 2023 – 2028

Í heildarverkætlanini eru 20 átøk, harav fleiri eru nýggj og verða løgd í Kvinnuhúsið. Sum dømi kann nevnast sjálvhjálparbólkar til menn og avvarðandi. Hesi átøk verða løgd til rættis, og bólkur til avvarðandi verður skjótt boðin út.
At Kvinnuhúsið er við í nærum øllum átøkunum í heildarætlanini – er hugaligt. Leinkja til heildarverkætlanina er her: heildaraetlan_hardskapur_endalig.pdf (cdn.fo)

## Nýggja ráðgevingin “Liv uttan harðskap”

Navnakapping: Í samband við, at vit skuldu byrja eina ráðgeving, sum eisini skuldi umfata harðskapsraktar menn og avvarðandi til harðskapsrakt, varð skipað fyri eini navna kapping. Áleið 17 fólk sendu uppskot inn og meira enn 40 navna uppskot vóru.
Eftir drúgva viðgerð varð navna-nevndin samd um, at tað var best um navnið á ráðgevingini segði nakað um, hvat ráðvegingin er. Ynski var at tá man “googlar” harðskap, so skal navnið koma fram. Tí bleiv avgjørt at leggja okkum upp at danska Lev uden vold / á føroyskum “Liv uttan harðskap”. Skrivað varð til Lev uden vold fyri at fáa teirra samtykki. Tey høvdu ikki upplivað “ at blíva uppkalla” fyrr og vóru glað um, at vit vildu brúka sama heiti sum tey.
Á samkomu á loftstovuni 18. sep. 2023 lat ráðgevingin upp og navnið var avdúkað. Hetta var ein hugnalig løta, har landsstýriskvinna Sirið Stenberg var millum røðararnar. Fitt av fólki komu at hátíðarhalda dagin saman við okkum.

## Altjóða dagur ímóti harðskapi móti kvinnum 25. november

Yvirskriftin hesaferð var: “Frá græsrótarørslu móti professionalismu”. Við framløgum og “sofapráti” varð varpað ljós á, hvussu harðskapsøkið hevur ment seg gjøgnum tíðina, og roynt var at seta orð á hvat status er í dag.

**Dagurin 25. november sum varð hildin 24. november**

Nær dagurin skal haldast fer helst at vera eitt afturvendandi evni at takað upp. SKAL tað vera á sjálvum 25. november? SKAL tað vera í ella eftir vanliga arbeiðstíð? Livst so spyrst.

## Verkstova á Hafnia 7. desember um markamótsarbeiði

Verkstova varð hildin fyri 50 fakfólkum, sum arbeiða á markamótinum til harðskapsøkið ein heilan arbeiðsdag. Endamálið og ambitiónin við verkstovuni var at menna og finna fram góðar konkretar loysnir við denti á at hjálpa tí harðskapsrakta best møguligt. Vit vita, at avbjóðingarnar eru nógvar, mannagongdir mangla og tøgnmentanin kring økið er tung og rungandi. Fakfólk hava vitan og royndir, sum hava týdning fyri samstarvið á harðskapsøkinum og eru tí lyklapersónar fyri at fáa markamótaarbeiðið í samband við harðskapsøkið at rigga betri.
Á skránni vóru fyrst framløgur við bæði góðari og neyðugari upplýsandi áfylling fyri týðandi økir. So sum harðskapsfakið og -økið, um tagnar-, upplýsingar- og fráboðanarskyldu og ikki minst um týdningin av mannagongdum fyri at samstarv og vitanarbýti millum avvarðandi myndugleikar. Hetta var ein vælskipaður, áhugaverdur og gevandi dagur. Vit síggja fram til samanumtøku av degnum.

## Húsabólkurin

Framtíðin hjá Kvinnuhúsvirkseminum – rúmast tað í KFUM? Vit hava í rúma tíð, onkur vildi kanska sagt í uml. 20 ár, tosað um umstøðurnar hjá Kvinnuhúsinum. Vit hava øll árini havt gott samstarv við KFUM og leiga høli til lagaliga leigu. Virksemi hjá Kvinnuhúsinum mennist og umstøðurnar fyri kvinnur og børn, sum gista á kreppumiðstøðini treingja til dagføring. Hetta hava vit vita leingi.Vit eru í samstarvið við Almannamálaráðið, sum hevur víst á møguleikar í teirra skipan. Í fjør summar vóru vit komin so mikið langt, at vit í samarbeiði við KFUM høvdu tvey arkitektafeløg inni, sum hugdu eftir viðurskiftunum, so at tey kundu koma við teirra uppskoti um

umvælingar. Í hesum arbeiði hava vit ásannað at fyri at framtíðartryggja virksemi hjá Kvinnuhúsinum, mugu vit hava fleir fermetrar at húsast í. ”Ting taka tíð” – vit eru í eini ”prosses”. Avtalur og sáttmalar skulu skrivast, so alt okkara virksemi kann framtíðartryggjast - vónandi 30 ár fram. Hetta er ein stór verkætlan, sum vit gleða okkum til.

### Limabólkurin

Hevur miðvíst arbeitt við at fáa limaskaran at melda seg sum lim á okkara nýggju talgilgu skipan á heimasíðuni. Tær hava skipað fyri kapping, fyri at eggja limum at melda seg. Hetta hevur gingið rímiliga væl.

### Gávur

Kvinnuhúsið hevur fingið fleiri gávur í 2023. Eitt nú málningar frá fleiri listafólkum at prýða veggirnar í nýggju ráðgevingini við; 130.000 kr. frá Ólavsøkuframsýningini hjá Lions Club Tórshavn og 20 % av plakat søluni hjá blaðnum Kvinna.

### Samanumtikið

Tað kenst sum vindurin blæsir við okkum. Til tíðir er krevjandi at fylgja við – samstundis sum tað er spennandi og mennandi. Nógv spennandi og mennandi er komið burturúr, og vit síggja fram til at fara í gongd við 2024. Fleiri ítøkiligar ætlanir og fyrireikingar eru í gongd, sum fara at vera við til at betra um tænastuna til harðskapsrakt og avvarðandi teirra enn meira. Takk fyri fyrimyndaligt samstarv.

## Tøkk til allar stuðlar

Vit vilja nýta høvi til at takka fyri alla vælvild og stuðul, sum Kvinnuhúsið hevur fingið. Tað veri seg við samstarvi, ráðgeving, regluligari sparring, fíggjarligum stuðli og gávum. Ein stór tøkk til Føroya Landsstýri, kommunur, grunnar, felagsskapir, myndugleikar, fyritøkur og einstaklingar.
Takk til miðlar og fjølmiðla fólk fyri regluliga at taka tráðin upp og varpa ljós á harðskap. Vit fegnast um at uppliva eina størri almenna tilvitsku um harðskap í parløgum og nærsambondum. Bæði tilvit og vitan um ymisku sløgini av harðskapi økist á henda hátt í samfelagnum.
Tøkk til okkara sjálvbodnu kvinnur, sum taka eina serliga ábyrgd og hond um aðrar kvinnur og børn teirra, ið hava upplivað ella livað við harðskapi.
Eisini ein tøkk fyri politiskt uppmerksemi og vælvild, og at Kvinnuhúsið verður tikið við, tá íð átøk eru, sum arbeiða fyri at betra møguleikarnar hjá vaksnum og børnum, ið hava verið fyri harðskapi í parlagi og nærsambondum. Hetta er við til at halda arbeiðnum uppi til at basa harðskapi.

## Hagtøl

Fyri at skjalprógva tørvin á Kvinnuhúsinum, og fyri at kunnu arbeiða meira málrættað við teimum avbjóðingum, sum harðskapsrakt hava – verða hagtøl skjalfest yvir allar áheitanir til Kvinnuhúsið. Vit hava ført hagtøl síðan fyrstu áheitan í 1990. Hagtølini eru navnleys, og persónar kunnu ikki kennast aftur. Tølini snúgva seg um vaksin, um ikki annað er upplýst.

## Áheitanir í 2023

Nógvar áheitanir vóru til Kvinnuhúsið í 2023, í alt 1.212. Av hesum snúðu 679 seg beinleiðis um harðskap. Hinar 533 áheitanirnar snúðu seg millum annað um samstarv, fyrispurningar, uppgávur/verkætlanir, miðlar og vitjanir.
Av teimum 679 áheitanunum um harðskap vóru 665 áheitanir frá kvinnum og 14 frá monnum. Tað er oftast tann harðskapsrakti sjálvur, ið vendir sær til Kvinnuhúsið, men í summum førum er tað Almannaverkið (5), lækni (5), løgregla (3), sálarfrøðingur (1), familja/vinir/arbeiðspláss (117).

Niðanfyri standandi hagtøl byggja á tær 679 áheitanirnar frá harðskapsraktum, ið ynsktu at gera brúk av teimum tilboðum Kvinnuhúsið bjóðar.

| | |
|---|---|
| 355 | áheitanir úr bý |
| 022 | áheitanir av bygd |
| 010 | áheitanir úr útlondum |
| 292 | áheitanir vóru ikki upplýstar |

Kvinnuhúsið hevur gjøgnum árini fingið áheitanir úr øllum kommunum í Føroyum. Á hvørjum ári eru eisini nakrar áheitanir frá útlondum.

## Orsøk til áheitanina

Sami persónur kann hava vent sær fyri fleiri trupulleikar, tí samsvarar talið av áheitanum ikki við talið av orsøkum.

| | |
|---|---|
| 162 skyldast | Likamligan harðskap |
| 619 | Sálarligan harðskap |
| 290 | Hóttanir um harðskap |
| 226 | Fíggjarligur harðskapur |
| 077 | Materiellur harðskapur |
| 017 | Annar harðskapur (t.d. útleigari, arbeiðsgevari o.o.) |
| 103 | Stalking |
| 094 | Kynsligur ágangur / blóðskemd |
| 009 | Neyðtøka |
| 001 | Fosturtøka |
| 039 | Separatión |
| 025 | Hjúnaskilnaður |
| 004 | Barnapeningur |
| 041 | Foreldramyndugleiki |
| 056 | Samverurættur |
| 027 | Búskapur |
| 042 | Bústaðarviðurskifti |
| 141 | Ymisk mentan |

## Úrslit av áheitanini

Kvinnuhúsið bjóðar, umframt samrøður við harðskapsrakt um harðskap og upplivingar av hesum, eisini holla ráðgeving og vegleiðing um praktisk og búskaparlig viðurskifti í samband við, hvussu harðskapsrakt kunnu koma víðari og fóta sær. Ráðgevar í Kvinnuhúsinum hava virkan leiklut at samskipa samstarvið við privatar og almennar stovnar og myndugleikar s.s. Almannaverkið, Rættarhjálp Føroya, løgfrøðing, Familjufyrisiting, peningastovnar, Útlendingastovu, Barnarvernd, løgreglu, lækna ella viðgerðarstovn.

## Aldurin á kvinnunum

| | | |
|---|---|---|
| 010 | | Yngri enn 18 |
| 002 | millum | 18 – 19 ár |
| 094 | | 20 – 29 ár |
| 221 | | 30 – 39 ár |
| 129 | | 40 – 49 ár |
| 100 | | 50 – 59 ár |
| 024 | | 60 ár og eldri |
| 085 | | Ikki upplýst |

## Aldurin á monnunum

| | |
|---|---|
| 006 | 30 – 39 ár |
| 002 | 40 – 49 ár |
| 001 | 50 – 59 ár |
| 005 | Ikki upplýst |

## Børn

Tær 665 kvinnurnar høvdu tilsamans 495 børn.
Aldurin á børnunum:

| | | |
|---|---|---|
| 081 | millum | 00 – 02 ár |
| 083 | | 03 – 06 ár |
| 063 | | 07 – 10 ár |
| 031 | | 11 – 14 ár |
| 053 | | 15 – 18 ár |
| 149 | | Yvir 18 ár |
| 035 | | Ikki upplýst |

## Tann, ið fremur harðskapin

| | |
|---|---|
| 298 | Makin |
| 153 | Fyrrverandi makin |
| 022 | Foreldur, systkin ella børn |
| 032 | Onnur |
| 036 | Ikki upplýst |

# Gistingar

12 kvinnur og 10 børn hava gist á Kreppumiðstøðini í 2023. Av hesum gistu 4 kvinnur fyri fyrstu ferð og 3 fyri aðru ferð. Ikki upplýst 1.

## Gistingardøgn (vaksin + børn)

Kvinnur og børn hava gist á Kreppumiðstøðini í tilsamans 625 samdøgur. Kvinnurnar gistu í 374 samdøgur og børnini í 251 samdøgur.

| | | |
|---|---|---|
| 05 | kvinnur | 01 – 07 samdøgur |
| 00 | | 07 – 14 samdøgur |
| 01 | | 14 – 28 samdøgur |
| 05 | | 30 – 60 samdøgur |
| 01 | | yvir 60 samdøgur |

## Aldur

Kvinnurnar vóru í aldursbólkunum frá 20 – 60 ár og eldri.

| | | |
|---|---|---|
| 02 | millum | 20 – 29 ár |
| 04 | | 30 – 39 ár |
| 02 | | 40 – 40 ár |
| 01 | | 50 – 59 ár |
| 02 | | 60 ár og eldri |
| 01 | | Ikki upplýst |

## Aldur á børnunum

Børnini vóru millum 2 og 14 ár.

| | | |
|---|---|---|
| 02 | millum | 00 – 03 ár |
| 05 | | 03 – 06 ár |
| 02 | | 07 – 10 ár |
| 01 | | 11 – 14 ár |

Tað eru oftast tey smærru børnini, ið gista saman við mammuni. Kvinnurnar gjalda 50 kr. fyri gisting pr. samdøgur. Haraftrat skulu tær sjálvar keypa og gjalda fyri mat.

## Flyting av Kreppumiðstøðini

| | |
|---|---|
| 05 | til nýggjan búðstað |
| 02 | heimaftur til makan |
| 02 | heimaftur – makin flutti út |
| 03 | annað |

### Harðskapurin

| | | |
|---|---|---|
| 04 | kvinnur | hava verið fyri likamligum harðskapi |
| 12 | | hava verið fyri sálarligum harðskapi |
| 11 | | hava verið fyri hóttanum |
| 06 | | fíggjarligum harðskapi |
| 03 | | materiellum harðskapi |
| 01 | | stalking |
| 04 | | kynsligur ágangur ella blóðskemd |

### Melda til løgregluna

| | |
|---|---|
| 01 | fer ikki at melda |
| 02 | vilja melda |
| 09 | umhugsa at melda |

### Orsøk til harðskapin

Kvinnurnar siga, at orsøkin til at maðurin fremur harðskap er:

| | |
|---|---|
| 01 | partvís uppvøkstur |
| 01 | ástarøvund |
| 03 | misnýtsla |
| 08 | ymisk mentan |
| 01 | ikki upplýst |

### Hvør fremur harðskapin

Fremjarin er úr øllum samfelagsstættum og í øllum aldursbólkum.

| | |
|---|---|
| 07 | hjúnafelagi/sambúgvi/unnusti |
| 03 | fyrrverandi hjúnafelagi/sambúgvi/unnusti |
| 02 | annar (foreldur, systkin ella børn) |

## Kvinnuhúsgrunnurin

### Búskapur

| | |
|---|---|
| Inntøkur: | Kr. 2.853.670 (Landstýri, kommunur, gisting og annar stuðul) |
| Útreiðslur: | Kr. 2.684.986 (Kreppumiðstøðin, rentir og granskoðan) |
| Eginpening.: | Kr. 3.932.740 (Uppsparing til hús) |

### Kvinnuhúsið/Kreppumiðstøðin

| | |
|---|---|
| Inntøka: | Kr. 2.570.746 |
| Útreiðslur: | Kr. 2.850.289 |

Kreppumiðstøðin leggur rakstarætlan fyri komandi ár fram fyri Grunnin. Síðani játtar Kvinnuhúsgrunnurin pening til rakstur av Kreppumiðstøðini.

## Kvinnuhúsfelagið

**Limafundir:** Sjálvbodnu vaktirnar hava høvi at hittast, samskifta, geva og fáa íblástur. Á limafundunum hava umboð fyri Kvinnuhúsið framløgur. Eisini verða einstaklingar, stovnar ella myndugleikar bodnir at greiða frá evnum, sum hava markamót til harðskapsfakliga økið.

**Konuveitslan:** 29. januar fyllir Kvinnuhúsfelagið ár. Í hesum sambandi bjóðaði felagið sjálvbodnu vaktunum ein góðan bita í Mettustovu. Hetta er ein tøkk fyri ólønta arbeiðið.

## Sjálvboðið arbeiði

### Arbeiðsbýti

| | |
|---|---|
| 35 | náttar- og vikuskiftisvaktir |
| 05 | nevndin í felagnum + 2 eykalimir |
| 03 | nevndin í grunninum + 2 eykalimir |

Arbeiðsøkið er býtt millum 35 kvinnur. Hesar eru býttar í 5 bólkar, 7 vaktir í hvørjum bólki. Hetta ger, at man sum sjálvboðin hevur eina forvakt og eina bakvakt 5. hvørja viku. Á henda hátt eru altíð tvær kvinnur á vakt alt samdøgrið
Okkara upplýsingar vísa, at sjálvbodnu vaktirnar, í allarflestu førum, eru kvinnur, ið eru virknar á arbeiðsmarknaðinum.

### Sjálvbodnir arbeiðstímar

| | |
|---|---|
| 10.950 | náttarvakt (15 t. x 365 dg. x 2) |
| 01.116 | vikuskiftis- og høgtíðsvakt (9 t. x 62 dg. x 2) |
| 00.360 | limafundir (2 t. x 9 mðr. x 20 pers.) |
| 00.150 | nevndarfundir (3 t. x 10 mðr. x 5 pers.) |
| 00.024 | grunnurin (2 t. x 4 fund x 3 pers.) |
| **12.600 t.** | **í alt** |

Tlf. 317200 – post@kvinnuhusid.fo – www. kvinnuhusid.fo – Kvinnuhúsið er á Facebook og Instagram